# Hoyringssvar til bekendtgørelse for Færøerne om autorisation af visse sundhedspersoner, der er statsborgere i og/eller uddannet i lande udenfor EU/EØS

Etiska ráðið takkar fyri møguleikan at koma við viðmerkingum til bekendtgørelse for Færøerne om autorisation af visse sundhedspersoner, der er statsborgere i og/eller uddannet i lande udenfor EU/EØS. Etiska ráðið tekur undir við broytingini, men hevur eisini nakrar viðmerkingar.

Tað hevur serstakliga stóran týdning, at tað ber til hjá fólki at samskifta á einum máli, ið tey tosa flótandi, tá tey eru í heilsuverkinum. Samskiftið kann ofta bæði vera um eym evni, hava stóran týdning, og vera um evni, ið tann einstaki hevur lítið innlit í. Tá er tað týdningarmikið, at fólk kunnu føla seg trygg at spyrja, skilja alt, sum verður sagt, og ikki skulu brúka óneyðuga orku at royna at samskifta á einum máli, sum er avbjóðandi hjá teimum at samskifta á. Málið er somuleiðis týdningarmikið tá um ræður samskifti millum heilsustarvsfólkini, so ein tryggjar sær, at eingin misskiljing er.

Tað besta hevði tí greitt verið, um ein antin hevði krøv um, at starvsfólk í heilsuverkinum tosa/skilja føroyskt, ella hevði kravda undirvísing í føroyskum til fólk, ið fáa fast starv í føroyska heilsuverkinum og røktargeiranum. Etiska ráðið skilir, at nú málsøkið er danskt, so er tað trupult at fáa eitt tílíkt krav inn, men tað besta hevði verið um ein fann eina loysn, sum onkursvegna nærkaðist einum tílíkum kravi. Ger ein tað, so hevði tað somuleiðis verið ynskiligt, at tað var galdandi fyri heilsustarvsfólk sum heild, heldur enn einans sjúkrarøktarfrøðingar.

Etiska ráðið stuðlar kortini ítøkiligu broytingina um at avtaka kravið um at duga danskt, tá um ræður sjúkrarøktarfrøðingar. Aftur her hevði tað verið ynskiligt, at sama broyting var galdandi fyri øll heilsustarvsfólk, men Etiska ráðið skilir, at Heilsumálaráðið er bundið av donsku kunngerðini, og tí ikki kann tað.

Etiska ráðið gongur út frá, at ein orsøk til broyttu málsligu krøvini er starvsfólkamangul, og ein roynd at víðka um møguleikan hjá fólkum, ið hava annan uppruna enn evropeiskan, at arbeiða innan heilsuverkið. Var talan um at avtaka eitt krav um førleika í føroyskum, so er tað meira ivasamt, um Etiska ráðið hevði tikið undir við tí kravinum. Danskt er hinvegin 2. mál hjá flestu íbúgvum í Føroyum, og tí er tað meira skiftandi hvussu væl føroyingar duga danskt. Seinastu árini eru tað eisini bæði blivnir alt fleiri føroyingar føddir í Føroyum, sum kenna seg meira heima í enskum enn donskum, og talið av fólki, ið hava annan uppruna enn

føroyskan/danskan er vaksið nógv. Hesi duga sjáldan danskt, og tað kann vera serstakliga avbjóðandi hjá teimum, um tey bæði skulu læra føroyskt og danskt, og savna tey seg tí sum oftast um at læra føroyskt.

Tískil metir Etiska ráðið at vinningurin við at avtaka kravið vigar tyngri, enn tað ein missur við at avtaka kravið um at duga danskt. Hetta serliga tí tað er óheppið, um vit hava fólk í Føroyum – ella sum eru áhugaði í at flyta til Føroyar -, sum annars hava neyðugu førleikarnar at arbeiða sum sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum. Tó mælir Etiska ráðið til, at ein so ella so tryggjar sær, at fólk, ið ikki duga ella skilja føroyskt, fáa útbúgving í tí, um tey fáa starv í føroyska heilsuverkinum ella røktargeiranum.

Vegna Etiska ráðið
Bergur Debes Joensen, formaður
Regin Berg, fakligur skrivari